## DAGSINS MEINING

# Ferðavinnupolitikkur

Ferðaráðið hevur givð út sniðhandbók til kommunur og onnur til tess at tryggja einsháttaða skelting og kunning fyri ferðafólk. Hetta verður gjørt sum ein liður í einum miðvísum ferðavinnupolitikki. Hetta er eitt gott tiltak, ið eigur at fáa góða undirtøku. Eftir tí, sum higartil fyriliggur, so fara kommunurnar at taka væl í móti sniðhandbókini.

Tað er eingin ivi um, at nógv er at vinna landsbúskaparliga við einum skilagóðum ferðavinnupolitikki. Fortreytirnar gerast alt betur við støðugt batnandi tænastuveitingum loftvegis eins og sjóvegis við Atlantic Airways og við nýggju Norrønu. Tað er einki at ivast í, at talið á ferðafólkum, turistum, fer at økjast munandi tey komandi árini. Við hesum í huga er tað av stórum týdningi, at vit eru væl fyri at taka ómóti einum vaksandi streymi av ferðafólki. Tí er neyðugt, at bera so í bandi at allir liðir samvirka og samstarva. Her er talan um kunning, gisting, tjaldpláss og allar hentleikar í hesum sambandi, ávísingar til náttúruvøkur pláss, søvn, kirkjur og annars alt, ið hevur áhuga hjá tí ferðandi. Vit eiga at hava í huga, at tað fólk koma higar at uppliva og at síggja, helst er nakað annað, enn tað tey kunnu finna á meginlandinum ella í heitari londum. Vit eiga tí at leggja dent á tað, sum er sermerkt so sum okkara mentan, náttúra og vinnulív.

Ein vaksandi ferðafólkaídnaður setir stór krøv til lokalsamfeløg og kommunur. Bygda- og býráð hava ábyrgd av, at allir hentleikar eru tøkir hjá turistunum, samstundis sum somu myndugleikar hava skyldu til at ansa eftir at turisman ikki skaðar umhvørvi og mentan. Her eiga landsmyndugleikar og lokalir myndugleikar at samstarva meira í framtíðini. Ferðaráðið hevur lagt væl út við sniðhondbókini og hon er eitt dømi um eitt neyðugt og gott samstarv við bý- og bygdaráð. Hetta samstarv er neyðugt, um ferðavinnan skal gerast eitt búskaparligt álit í framtíðini.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Formaðurin í Føroya Blaðmannafelag sigur ósatt

**Høgni Hoydal**
*formaður Tjóðveldisfloksins*



**Formaðurin í Føroya Blaðmannafelag sigur ósatt um undirritaða í Útvarpi Føroya, hóast hann hevur allar møguleikar at kanna, hvør veruleikin er. Harvið gongur hann undan í tí, sum eg havi valt at mótmæla ímóti. At persónar kunnu leggjast undir slatur og sleyg í fjølmiðlunum, uttan at hava nakran møguleika at verja seg.**

**Eg fari tí at senda eitt skriv til Føroya Blaðmannafelag við spurningi um, hvørja støðu felagið hevur til viðgerð av persónum í føroyskum fjølmiðlum.**

Tað er gott, at Føroya Blaðmannafelag fer at viðgera hendingina millum ein landsstýrismann hjá Tjóðveldisflokkinum og tíðindafólk hjá SvF.

Men eg vil undir ongum umstøðum góðtaka, at formaðurin í Føroya Blaðmannafelag, Edvard Joensen, sigur ósatt fyri opnari mikrofon í Útvarpi Føroya. Hann sigur seg "hava hoyrt", at formaðurin í Tjóðveldisflokkinum á flokstingi hevur sagt, at hann vil stýra, hvat fjølmiðlarnir gera og ikki gera.

Hetta er beinleiðis ósatt. Eg havi ikki í mínari formansfrágreiðing ella á flokstingi sagt nakað sum helst um at vilja stýra fjølmiðlunum. Eg hava talað at ítøkiligum hendingum, har fjølmiðlarnir hava havt søgur, sum beinleiðis leggja persónar í Tjóðveldisflokkinum (harundir undirritaða) undir at hava gjørt og viljað ymist. Og umrøddu persónar hava ikki fingið møguleika at svara ella greiða frá síni støðu til hesar hendingar, áðrenn søgan fer út sum veruleiki.

Eg havi víst á, at persónsmál eru viðgjørd, har bert annar parturin sleppur at útleggja sína hugsan um hendingar, og so verður tað framhildið sum sannleikin. Eg haldi tað vera ómetaliga grovt og eftir mínum tykki brot á alla ábyrgd hjá fjølmiðlunum.

Tað er mín demokratiski rættur at siga hetta, eins og tað er rætturin hjá einum og hvørjum øðrum at siga sína hugsan.

**Slatur og sleyg sum tíðindi**

Hvat eg havi sagt í míni formansfrágreiðing og annars á einum almennum flokstingi, hevði formaðurin í Føroya Blaðmannafelag fingið staðfest, um hann hevði kannað málið. Formansfrágreiðingin er almenn og liggur á internetinum. Og nógv meira enn 100 vitnir – harundir fjølmiðlafólk – kunnu spyrjast um, hvat eg havi sagt og ikki á flokstingi.

Men formaðurin í Føroya Blaðmannafelag velur ikki at kanna, hvat er sagt. Ístaðin sigur Edvard Joensen seg "hava hoyrt" at eg havi sagt hetta og hatta, og á hesum grundarlagi leggur hann harðliga eftir undirritaða sum formanni í Tjóðveldisflokkinum í Útvarpi Føroya.

Harvið gongur formaðurin í Føroya Blaðmannafelag undan við júst tí, sum eg havi loyvt mær at tala at. Og sum eg framhaldandi ætli mær at tala at. Nevniliga, at persónar kunnu viðgerast í fjølmiðlunum og leggjast undir slatur og sleyg, uttan at hava nakran møguleika at verja seg.

Fyri mær er hetta sera óhugnaligt, og eg vil als ikki finna meg í hesum. Hetta bendir á, at ert tú politikari, so skalt tú ikki rokna við, at tú hevur nøkur vanlig rættindi ella talufrælsi, eins og ein og hvør annar borgari. Hetta bendir á, at tú ikki skalt fyrireika teg uppá at grundgeva og verja tað, sum tú hevur gjørt sum politikari, men tú skalt vera áskoðari, meðan onnur kunnu siga hvat sum helst um teg sum persón og um títt lyndi.

**Sendi fyrispurnging til Føroya Blaðmannafelag**

Eg skal tí hervið boða frá, at eg fari at senda ein fyrispurning til Føroya Blaðmannafelag um, hvørja støðu felagið hevur til viðgerð av persónum í føroyskum fjølmiðlum.

Samstundis skal eg sláa fast, at undirritaði og Tjóðveldisflokkurin leggja ikki eitt hálmstrá í vegin fyri at fjølmiðlafólk fáa gjørt sítt arbeiði.

Um formaðurin í Føroya Blaðmannafelag kann vísa mær á nakað dømi, har fjølmiðlar – orsakað av undirritaða og Tjóðveldisflokkinum - ikki hava fingið atgongd til teir upplýsingar, teimum tørvar, til tess at útinna sítt týdningarmikla starv mótvegis politisku skipanini, so frætti eg fegin.

# Tað er púra vist

**Edvard Joensen**
*formaður Føroya Blaðmannafelags*

Tað er púra vist, at tað er ósatt, at formaðurin í Føroya Blaðmannafelag sigur ósatt.

Aðra almenna viðmerking havi eg ikki til formannin í Tjóðveldisflokkinum, Høgna Hoydal, sum heldur, at formaðurin í Føroya Blaðmannafelag sigur ósatt.

Tað er ikki uppgávan hjá Føroya Blaðmannafelag at leggja seg út í blaðkjak við nakran, og tað verður heldur ikki gjørt.

Føroya Blaðmannafelag fer tó altíð at verja rætt limanna til arbeiðis.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.


## VIÐMERKINGAR

# Tá veruleikin ikki kann nýtast – skapa vit ein annan!!!

**Áki Andreasen**



Sosialurin vil í oddagrein mikudagin 09.apríl halda stásið við líka, og leggur eftir Tjóðveldisflokkinum - eftir yvirlýsingina frá flokstingi Tjóðveldisfloksins.

Blaði dittar sær sum ikki einaferð at gerða nakrar niðurstøður sum als ikki nýtast at undirbyggjast - tað er nógmikið at sleinga eitt ella annað fram fyri dagin, takað nakrar hendingar fram og knýta eina niðurstøðu sum er eins tannleys sum anstøðupolitikurin.

**Í Føroyum gongur alt….ella???**

Fyrst er tað sjálvandi gjøgnumtanlaða fjølmiðlaøsingin seinasta summar, sum skal takast fram; niðurstøðan er tann at hevði tað verið í einum øðrum landi hevði løgmaður stevnt og sagt samstarvið við Tjóðveldisflokkin upp - verða nevnd dømi um hetta….nei tað nýtist ikki; men eg vil eisini gera vart við at hevði tað verið bara onkra aðrastaðni so høvdu fjølmiðlarnir eisini kanna málið og sett løgmanni ein konkretan spurning: "er tað satt sum tingmaður Tjóðveldisfloksins førdi fram??" - men tað gjørdi fjølmiðlarnir ikki - tað nýttist ikki.

**"Syrgiligasta persónsmálið í langa tíð..??"**

Síðan er tað setanin av landsfornfrøðinginum - verður doypt "syrgiligasta persónsmálið í langa tíð". Hvat var sjálv kjarnan í málinum??? Hon er gjøgnumgingin meir enn einaferð, men kortini velur oddagreinskrivarin at gera sína egnu niðurstøðu: "**Sum málið leið gjørdist alt sjónskari at málið var stýrt úr erva - frá sjálvum formanninum**" - hvar er undirbyggingin, fyriliggur nakað sum prógvar hetta??? - nei!; tað nýtist helst heldur ikki; man velur bara at skoyta uppí at: "**……..tað sama siga tey sum ikki eru í hallujakórinum….**". Hevði eg ikki vita betur so hevði eg noktað fyri at trúð at talan var um eina oddagrein, ikki ein farri av grundgeving ein stórur pástandur úr enda í annan, vorið sum tíðindaflutningur!!!!

**SVF, Sosialurin og heiðurligur tíðindaflutningur**

Fyiri at tað skal ganga heilt upp so má klagan hjá SVF eisini dragast uppí "oddagreinasannleikan", tá ein landsstýriðsmaður heitti á eina tíðindakvunnu um at fara út og vísti til eina avtalu við SVF - nú ber væl til hjá Sosialinum at taka SVF inn í sína "tjóðveldisherðferð", men ikki eitt orð um avtalu millum landsstýrismannin og SVF; ikki eitt orð um at formaðurin í Tjóðveldiflokkinum fyri stuttari tíð síðan sendi SVF eitt eina klagu fyri teirra leiklut í einum innslagið sum skuldi verða ein gøla, men sum av øllum Føroya fólkið bleiv fata sum reint sneytaríð inni í einum flokshølið; ikki eitt orð um at Tjóðveldisflokkurin hevði atlanir um ein tíðindafund, um samgongan slitnaði - nevniliga fyri at kunnað fjølmiðlarnar - nei tað nýtist ikki, tí tað riggar ikki inn í tann "*veruleikan*" sum oddagreinarnar í Sosialinum standa fyri. Heldur ikki nýtist oddagreinskrivaranum at kunna um at formaður Tjóðveldisfloksins hevur boðað frá, at hann fer at svara klaguni hjá SVF

Syrgiligi toppurin á kransakakuni er so tann at heldur ikki tíðindafólkini í SVF halda at tað tænir nøkrum endamálið at kunnað almenningin um at stovnurin hevur fingið eina klagu frá Tjóðveldisflokkinum viðv. teirra egna tíðindaflutningi.

**Tá veruleikin ikki kann brúkast**

Tað sum hevur verið gjøgnumgangandi fyri oddagreinar í Sosialinum tá endamálið hevur verið at svína Tjóðveldisflokkin og tjóðveldisfólk til er nevniliga tann at ongar grundgevingar eru, tær nýtast ikki, men setningar sum "**øll vita…**" - "**Føroya fólk veit"**, "**..gamla gardan**" "**Høgnavongur" "borgarligi vongurin**" "**sosialistiski vongurin**" o.sfr alt setinigar og orð sum eru skaptar í Oddagreinum í Sosialinum og sum als ikki kunnu knítast til politiska veruleikan ellan innanhýsisviðurskiftini í Tjóðveldisflokkinum. Menn enn einaferð tað ger einki tí grundtankin handan Oddagreinskriving í Sosialinum eru "***tá veruleikin ikki kann nýtast - skapa vit ein annan!!!***" - grundgevingarnar fyri hesum eru at finna í óteljandi oddagreinum í Sosialum seinastu 5-6 árini, seinast í Oddagrein mikudagin 04. apríl 2003.

# Just a dream, my professor!

**Sjúrður Hansen**
*Gøta*

7. desember. Eg siti saman við góðum fólki í Klaksvíkar Klubba. 19. apríl 2003. Eg siti saman við góðum fólki í Mimir ella Kagganum. Ja, dagin undan jólum verður røtt um skaldið av Viðareiði og dagin fyri páskir tann 19. apríl 2003 verður talað um 101-ára føðingardagsbarnið av Tvøroyri og úr Sandvík, Martin Joensen, vit sita í Havnar klubbum. Onkur spyr kanska eftir skálvíkinginum (Heðin Brú). Og farið verður upp á gólv á Tvøroyri 2. páskakvøld. Tað lýsir á landi, hugsi eg. Og syngjandi lag? – heiðrandi.

# Flaggdagshald á Regensen

TÍÐINDASKRIV

Flaggdagin 25. apríl verður Merkið heiðrað kring alt Føroya land, men eisini í Danmark verður skipað fyri flaggdagshaldi. Á studentagarðinum Regensen, ið liggur beint við Rundatorn mitt í Keypmannahavn, verður aftur í ár skipað fyri flaggdagshaldi.

Tað var júst á Regensen, at Merkið veittraði fyri fyrstu ferð, eftir at føroyskir studentar har tíðliga í farnu øld fingu hugskotið at sniðgeva eitt føroyskt flagg.

Í fjør ognaði Regensen sær aftur eina útgávu av Merkinum, og í tí sambandi varð avgjørt at skipa fyri flaggdagshaldi.

Í ár heldur føroyski fólkatingslimurin Tórbjørn Jacobsen røðu á donskum, og danska kallakórið "Cantantes Animi" fer at syngja føroyskar sangir. Flaggdagshaldið á Regensen tann 25. apríl byrjar klokkan 17.

# Samferðsluhavn á Trongisvági og tunnil Øravík/Hov

**Kristin Michelsen**



Álvaratos, hvat vilja tygur suðuroyartingmenn? Hvønn umboða tygur? Viðvíkjandi samferðsluhavnini komu tveir tinglimir til Suðuroyar í samband við at varðveita skerið við Lítla Holm, eftir at allar kanningar og øll loyvir vóru fingin til vega. Ein triði tingmaður kannar sær nærum "patent" uppá nýggju linjuføringina av tunnlinum Øravík/Hov. Og so tann fjórði tingmaðurin. Hann er formaður í vinnunevndini, og hevur havt málið um samferðsluhavnina í nevndini í millum tríggjar og fýra mánaðir. Nú er so málið komið úr vinnunevndini, og skal sostatt til 2. viðgerð, men har eru munandi broytingar í uppskotinum. Seks av sjey limum í vinnunevndini koma við einum áliti, at samferðsluhavnin og tunnilin í millum Øravík og Hov skal knýtast saman, tí hetta kemur at spara tí almenna umleið 45 milliónir krónur. Ja lat ogum so siga at so er, men ikki ein av suðuroyartingmonnunum nevnir eitt orð um, at hesar 45 milliónir krónurnar skulu verða eftir í Suðuroy, sjálvt um tygur eru vitandi um, at nærum alt vegakervið og tunnlarnir í oynni eru afturúrsigld.

Tingmennirnir fyri Sandoynna hava fyrispurning um farleiðina Skopun/Streymoy, og enntá eisini fyrispurning um farleiðina millum Sandoynna og Suðuroynna. Ikki eitt orð frá ogra tingmonnum.

Eitt kunnu ogur øll í Suðuroy vera samd um, tað er, at tunnilin í millum Øravík og Hov er fluttur nógv longur vestur, bæði fyri sunnan og fyri norðan, og er hetta bert at fegnast yvir. Men ogra tingmenn góðtóku, at tunnilsføringin skuldi verða har, ið Landsverkfrøðingurin vísti á. Enntá tá verandi landsstýrissamgonga varð stovnað, var krav frá Tjóðveldisflokkinum, sum Hergeir umboðar, at ongin útlendingur skuldi gera tunnilin, tað skuldi Landsverkfrøðingurin gera.

Her er ein áheitan á øll tingfólk, um at hetta eru tvey mál, samferðsluhavnin og tunnilin. Skulu suðuroyingar bíða við havnini til byrjað verður uppá tunnilin, so veit eitthvørt mannsbarn, at skipið kemur til landið, og onki atløgupláss tøkt í Suðuroy. Tað vil verða ein stór skomm, einamest fyri tygum suðuroyartingmenn.

Um so er at havnin bert verður gjørd liðug framvið landi, er tá nøkur trygd fyri at skipið liggur trygt tá? Eru kanningar gjørdar av tí? Nei!

Víðvíkjandi grótinum, ið kemur úr tunnlinum Øravík/Hov kann bert upplýsast, at allar kommunurnar í oynni hungra eftir gróti. Tvøroyrar Býráð hevur í samband við samferðsluhavnina biðið tvey feløg um eina kostnaðarætlan fyri at gera tunnlar inn í fjallið sunnanvert Drelnes, til at taka grót til havnina, og vil Landsverkfrøðingurin taka tað við í útbjóðingini sum alternativ. Við hesum uppskotinum verður onki sár í náttúruni, millióna virðir liggja eftir, ongir vegir oyðilagdir og flutningur bert nakrar fáar metrar. Hetta halda ogur vera eina góða loysn, og skal tvídráttur vera, um hvør skal eiga hesar tunnlar í millum tingfólk og onnur, so er betur, at allir partar sessast og finna eina loysn um hetta góða uppskot. Grótið til havnina kann verða leverað á staðnum, og vil tað taka fimm mánaðir.

Enn einaferð ein áheitan á tygum øll tingfólk, havi hesi uppskot hvør sær, og somuleiðis til tygum suðuroyartingmenn, somu áheitan, umboðið Suðuroy fyrst og fremst.

Vinnunevndini, takið undir við uppskotinum frá 14.01.2003, og takið álitið aftur. Annars vegna Tvøroyrar Býráð stóra tøkk til Heðin Zakariassen, fyri tín leiklut í vinnunevndini, tað skuldi ikki verið tú, ið gekk á odda Suðuroynni at frama.

Viðmerkjast skal at Tvøroyrar Býráð fegnast um nýggju tunnilsføringina Øravík/Hov. Tað skal ikki skiljast, at ogur eru ímóti tí, lat allar kanningar verða gjørdar bæði væl og virðiliga áðrenn byrjað verður, tað kemur bert tilgóðar hjá ogum suðuroyingum.